gult cyan magenta svart

út at koyra

GM eru stórstir

Heimsins stórsti bilaframleiðari er General Motors, framman fyri Ford Motor Co., sum er nr. 2, og Toyota Motor Corp. sum nr. 3.

Kelda FDM / Motor

700 milliónir bilar

Tað eru umleið 700 milliónir bilar í øllum heiminum, harav eru yvir 500 milliónir persónbilar.

Kelda FDM / Motor

Ford og Kangoo kappast

Ford kemur næsta ár við einum bili, sum líkist Renault Kangoo. Nýggi bilurin kemur ístaðin fyri teir Fiesta- og Escort-baseraðu vørubilarnar.

Kelda FDM / Motor

Reiður í lyft

Um hendan kvørkveggjan er glað fyri bilar ella ikki meldar søgan einki um. Men hon hevur bygt sær reiður - og lagt fimm egg í billyftaranum hjá Føroya Ellisakførum í brunninum við Gráastein í Havn.

SOS International, stórsti alarmsentralur í norðanlondum

Her kemur ein bilur hjá SOS International við nøkurum bilum, sum vóru undirkavaðir í einum skalvalopi í Eysturríki í fjør

MAGNUS GUNNARSSON

Í fótbólti kann avleiðingin av reyða kortinum verða eitt brotsspark, men tá farið verður uttanlands við bili, kann reyða kortið verða avgerandi fyri, um ferðin eydnast ella ikki.

Eykalutir loftvegis

Stórsti alarmsentralur í Norðanlondum er á Frederiksberg í Danmark. Har arbeiðir eitt nógv virt altjóða lið við at hjálpa skandinavum, sum hava trupulleikar við bilinum, og teimum sum eru vorðin sjúk viðari í frítíðini ella við heimferðini, um tað er neyðugt.

Uppgávurnar eru nógvar hjá SOS International á Frederiksberg, har 110 tryggingarfeløg hava sína felags hjálparmiðstøð. Serliga í summarfrítíðini avgreiðir SOS eina óteljandi mongd av áheitanum frá fólki úr t.d. Danmark, Svørriki, Noreg og Finnlandi eins og úr Føroyum, sum hava trupulleikar á biltúrinum sunnanfyri.

Hjá summum er tað so álvarsligt at brúk kann verða fyri sjúkrabili ella talan er um eitt deyðsfall. Á miðstøðini verður tosað á ymiskum málum, so sum fronskum, grikskum, týskum sponskum o. s. fr. Serliga á týskum, tá trupulleikar ofta eru á teim týsku motorvegunum. Nakrar umstøður eru meira krevjandi enn aðrar, men øll skulu hava hjálp, eisini um ein bilur er uppstøðgaður fyri bensin. Um eykalutirnir eru ringir at fáa hendur á, har ferðafólkini eru stødd við bilinum, verða teir sendir loftvegis við skundi, um tað so er til Marokko, Ísrael, ella hvar tað skal vera.

Holla vitan um bilar

Fólk eru á alarmsentralinum alt samdøgrið. Um dagin kunnu vera heilt upp til 35 starvsfólk, sum umframt at duga mál, eisini skulu hava holla vitan um bilar, so tey kunnu tosa um umvælingartørvin við bilverkstøðini og sýnsmenn. Eisini hava tey tilknýti til læknar, serlæknar, sjúkrahjálparar, sálarfrøðingar ella til kreppuhjálp sum verður tilkallað, tá brúk er fyri tí.

Tá tørvur er á hjálp, eru øll vælkomin at ringja til SOS og spyrja seg fyri og fáa vegleiðing, sjálvt um bilurin ikki er kaskotryggjaður.

Persónsflutningur er ein stórur partur av arbeiðinum hjá SOS, sum seinasta ár viðgjørdi 25.000 persónsskair fyri tryggingarfeløgini. Hetta var ein øking uppá 13 prosent frá 1998.

SOS hevur samband við meira enn 30.000 størri og minni fyritøkur, so sum bilverkstøð, bilaútleigarar, gistingarhús og sjúkrabilatænastur.

Óneyðugar tryggingar

Michael Klitvad, varastjóri hjá SOS International, heitir á fólk um at seta seg væl inn í tað, sum teirra tryggingar umfata. Tað vísir seg ofta, at tá fólk keypa ferðaseðlar á ferðaskrivstovum, tekna tey ofta fleiri tryggingar, sum tey frammanundan hava goldið fyri hjá tryggingarfelagnum.

Kelda: FDM / Motor

Her á alarmsentralinum á Frederiksberg samráðast tey við bilverkstøð, bilaútleigarar, gistingarhús, sjúkrahús og tollmyndugleikar í øllum Europa

út at koyra

Onkur hevur kallað nýggju Opel Agila og Suzuki Wagon R fyri smáar flytikassar, tí teir hava gott plass til fýra vaksin og eru hentir til viðførið

Mynd: Jens Kristian Vang

Opel Agila

Motorurin 4 syl 1,2 l 16V 75 hk

0-100 km/t13,5 sek. / 5 gear

Bensinnýtsla 15,4 km/l

Dekkstødd 155/65-14

Støddog vekt
Longd 350,0 cm
Breidd 162,0 cm
Hædd 169,5 cm

Eginvekt 975 kg

Viðførisrúm 240 litrar (við setrunum uppi)

Prísur 130.000 kr - Agila 1.0 l kostar kr 123.900 kr

Søluumboð P/F Meinhardt Arge

Agila — ein rúmligur innkeypsvognur frá Opel

MAGNUS GUNNARSSON

Herfyri skrivaðu vit um tveir bilar, sum vóru á veg. Ein nýggjan Opel Agila og Suzuki Wagon R í nýggjari útgávu. Nú eru báðir komnir til landið. Opel hevur gjørt samstarvsavtalu við Suzuki um Agila, ið verður gjørdur á einari nýggjari GM verksmiðju í Pólandi.

Mikrovan ella MPC

Hesir bilar verða kallaðir Mikrovan ella MPC (Mini People Carrier). Onkur hevur kallað teir fyri smáar flytikassar, sum eisini hóskar væl, tí teir hava gott plass til fýra vaksin og fleiri møguleikar til viðførið.

Tey sum koyra við hesum bilum, merkja ikki nógv til, at tey koyra í einum lítlum bili. Tey sita høgt við góðum útsýni, og innan er Agila nærstan sum einhvør annar meðalstórur bilur, hvat sitiplássi viðvíkur.

Tað at tey á baksetrinum sita 10 cm hægri ger, at t.d. børnini eisini kunnu fylgja við í ferðsluni. Hetta er júst bilurin til fólk, sum hava tørv á einum rúmligum bili, sum ikki fyllur ov nógv í ferðsluni í býnum.

Agila krevur lítið plass fyri at fyri venda runt og er lættur at parkera.

Trygdin í ordan

Við ein samantoyt, hava bilar í hesi støddini ikki tær stóru flaturnar at verja seg við. Tí er øll konstruktiónin gjørd á ein slíkan hátt, at tey ferðandi verða væl vard við ein frontalan samanstoyt.

Nógv er gjørt burturúr ljóðisoleringini millum motorrúmið og kabinuna. Eitt nú er onki mekaniskt samband millum motorin og speedaran, við tað at ein sensorur á speedaranum sendur signal til eina stýriskipan á motorinum.

Aglia fæst við tveimum ECOTEC motorum, annar er 3 syl. 1.0 litur við 58 hk, og hin er 4 syl. 1.2 litrar og 75 hk.

Bilurin, vit royndarkoyrdu, hevði 1.2 l motorin, og hóskaði hann sera væl til bilin.

Opið hús leygardagin

Av trygdarútgerð kann t.d. nevnast ABS bremsur, airbag til bilføraran og síðumannin, el-síðuspegl, elektroniska startsperru og stálbjálkar inni í hurðunum. Annars hevur hann sentrallás, el-síðurútar framman, pollenfiltur, elektroniska servostýring, stereoradio við fløguspælara og fýra hátalarum.

Í morgin, leygardagin, verður opið hús frá kl.10.00 til 16.00 hjá P/F Meinhardt Arge við Øyggjarvegin, har Opel Agila verður sýndur fram, og høvi verður at royndarkoyra hann.